# Annita bjóðar Karsteni av



**Á flokstinginum um 10 dagar skulu tjóðveldisfólk velja millum núverandi politiska næstformannin úr Norðoyggjum og kvinnuna úr Suðurstreymi. Avbjóðarin heldur, at flokkurin verður styrktur, tá ið fólk kunnu velja ímillum tvey uppskot. Næstformaðurin umhugsar sína støðu og fer møguliga at trekkja seg áðrenn flokstingið**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað er lagt upp til stríðsval um, hvør skal vera politiskur næstformaður í Tjóðveldisflokkinum.

Freistin fyri at skjóta valevni upp var úti um vikuskiftið, og tá ið freistin var farin, vóru tvey í uppskoti. Annar er Karsten Hansen, tingmaður fyri Norðoya valdømi, og hin er Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna fyri Suðurstreymoyar valdømi. Tað er Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, sum hevur skotið upp at velja Annitu til politiskan næstformann.

– Eg fekk eina áheitan frá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag um at stilla upp, og eg havi tikið av. Flokkurin verður bara styrktur av, at vit hava eitt val um næstformannin. Tað er ósunt, um flokkurin ikki av og á hevur eitt val um sessirnar í leiðsluni, sigur Annita á Fríðriksmørk.

*Stillar tú upp, tí tú ert ikki nøgd við verandi næstformann?*

– Nei, tað er ikki orsøkin. Karsten hevur gjørt eitt gott arbeiði, og hann er eitt gott umboð fyri flokkin. Eg stilli ikki upp fyri at fella hann, men meira tí at eg havi hug at verða við í arbeiðnum í starvsnevndini. Eg síggi hetta ikki sum eitt stríðsval, men um eitt val, har fólk í flokkinum fáa møguleikan at kjakast um viðurskifti í flokkinum og at velja næstformannin.

**Karsten umhugsar sína støðu**

Karsten Hansen heldur eisini, at tað er í lagi, at Annita stillar upp til næstformansvalið.

– Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag heldur, at ein kvinna skal verða við í ovastu leiðsluni í flokkinum, og tað eri eg ikki so ósamdur í. Nú umhugsi eg støðuna hjá mær, og tað kann verða, at tað ikki verður eitt val yvirhøvur, sigur Karsten Hansen.

*Ætlar tú at trekkja teg áðrenn valið?*

– Nú er skipanin soleiðis, at sitandi næstformaður av sær sjálvum er í uppskoti, men møguliga er tað ikki neyðugt hesaferð. Hetta er alt nýtt, so eg havi ikki tikið nakra endaliga avgerð um, hvat eg ælti mær at gera, men tað geri eg í góðari tíð áðrenn flokstingið.

**Valdur í 2004**

Flokstingið verður fríggjadagin 31. mars og leygardagin 1. apríl. Tá skulu umboðini fyri tey sjey valfeløgini eftir øllum at døma gera av, um Karsten Hansen skal halda fram sum politiskur næstformaður, ella um tað fyri fyrstu ferð í søguni skal sita ein kvinna í politiska næstformanssessinum í Tjóðveldisflokkinum.

Karsten Hansen hevur verið politiskur næstformaður í eitt stórt ár. Hann varð valdur á eykaflokstinginum fyri jól í 2004. Tá varð hann valdur í stríðsvali við Tórbjørn Jacobsen, sum síðani í oktober hetta árið hevði verið í almennari orrustu við floksformannin Høgna Hoydal.





Arbeiðsuppgávurnar hjá HTM umfata m.a.:

- Upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til borgarar, almennar myndugleikar og onnur.
- Málsviðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól,bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- Útlán og endurnýtsla av hjálpartólum.

Søkt verður eftir hølum til
Hjálpartólamiðstøðina

Hølini skulu vera egnað til skrivstovur, goymslu, verkstað og onnur viðskiftahølir.

Hølini skulu vera í miðstaðarøkinum og er ynskilig stødd 1000 – 1500 kvm, harav 350 – 500 kvm til skrivstovu.

Áhugað kunnu venda sær til Palla Mortensen, leiðara á tel. 358300 ella Petru J. Joensen, stjóra, á tel. 353510.

HTM
HJÁLPARTÓLA-MIÐSTØÐIN

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Stovnurin er landsumfatandi.

KREA.FO · TEL 47 80 80



Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projekterings- og eftirlitsarbeiði við rørtekniskum innleggingum:

- HVS-innleggingar
- Ventilatiónsskipanir
- Kloakk skipanir
- Vatnveiting
- Fjarhitaskipan
- Sprinklaraskipan
- Maskintekniskar skipanir

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving í verkfrøði ella líknandi og royndir við omanfyri nevndu arbeiðsøkjum.

Tað er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Roknast kann við, at ein partur av arbeiðnum fer fram uttanlands.

Tað er ein treyt, at tú dugir at arbeiða við teldu og forritum sum Word, Excel, MSProject og AutoCad/ABS.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu millum partarnar.

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til Árna Jakobsen tel 353521/233521.

Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 28. mars 2006.

TEAM85

Pf. Sofus M. Jakobsen
Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.

J.H. Schrøtersgøta 22, Postmoga 344, FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 353522 Fax (+298) 310622



TEKNISKUR SØLURÁÐGEVI

Til teknisku deild okkara
verður søkt eftir søluráðgeva




Royndir okkara tey seinastu 60 árini, hava gjørt okkum til ein tann størsta HVS heildarveitara í Føroyum. Vit bjóða fram heildarloysnir innan hitaverk, vatn, sanitet, ventilatión, kloakk og ba irúmsmøblar

Tað setur krøv til starvsfólkið

Tú kemur at ráðgeva kundum okkara og hjálpa teimum at finna tað røttu loysnina. Tú kemur at rokna út tilboð, og verða við til at fyrireika størri verkætlanir og fylgja teimum í verki.

Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan á at menna fyritøkuna.
Tú kemur soleiðis, í samstarvi við onnur, at virka á einum spennandi og fjølháttaðum arbeiðsplássi.

Tað er ein fyrimunur um tú

- Hevur røttu útbúgving og/ella drúgvar royndir
- Hevur royndir innan vhs, ventilation ella líknandi
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi, nærlagdur, íðin, og kreativur
- Skilur týdningin av at góðum handverki, dygd og góðari kundarøkt

Afturfyri bjóða vit

- At tú fært eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- At tú fært góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- Ávirkan á tín egna arbeiðsdag
- Løn, í samsvarar við tín førleika
- Stutt sagt, eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning

Sosialurin 341800

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000
og tosa við Kristian á Dul, stjóra.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum,
skal verða innkomin seinast 7. apríl til:

Maria Poulsen pf

Smyrilsvegur 8 · 100 Tórshavn · Tel 31 20 00 · www.mariapoulsen.fo